Til minnis um mín elskaða beigga, Høgna á Borg

6/5-70 — 2/12-02

Tungir eru dagarnir síðani tú fór frá okkum. Saknurin er stórur. Men eg veit, at vit síggjast aftur ein dag.

Vit bæði hava havt nógvar góðar løtur saman. Tú vart stóri-beiggi mín, og hevði meg altíð við út at spæla, har vit spældu nógv ymiskt, tá vit vóru smá. Sjálvt um tað vóru fimm ár ímillum okkum, so vóru vit tætt knýtt at hvørjum øðrum.

Síðani vart tú venjari hjá mær í fótbólti í eini trý ár, og tað dámdi mær sera væl. B36 fylti nógv í tínum hjartað.

Tú fylgdi við í bæði heima- og útidystum hjá 1. deild, har tú sjálvandi eisini hugdi eftir lítla-beiggja okkara. Tað verður undarligt í ár, tá kappingin byrjar, og tú ikki sæst ella hoyrist millum áskoðararnar longur.

Guðrið kom so, og tú bleiv gubbin hjá henni. Tit bæði vóru so góð við hvønn annan. Tú gav henni nógv, og hon spyr oftani eftir tær. Og hon veit eisini, at tit síggjast aftur.

Nógva tíð brúkti tú summarhálvuna við Leynarvatn. Tú plagdi at vera hjá mammu og teimum áðrenn og smyrja tær ein stóran matpakka, tí tú væntaði at vera burtur í nakrar tímar. Tú elskaði at fiska laks. Har fór nógv tíð til at fiska, og tú vart so stoltur, tá tú hevði fingið nakrar, og gav okkum altíð burturav.

Hvønn døgurðatíma vart tú uppi hjá ommu og át døgurða, har vit eisini vóru. Og ofta fingu vit okkum eitt deiligt prát omaná við einum drekkamunni.

Góði Høgni. Takk fyri alt, tú hevur verið fyri meg. Guðrið og Bogi lata heilsa. Hvíl í friði.

Systir tín, Marian

Hava tygum tørv á einum bili í nakrar tímar, dagar ella longur, er skilagott at leiga, heldur enn eiga!
Setið tygum í samband við okkum,
- tað loysir seg!!

AVIS BILÚTLEIGAN

Staravegur 1, Tórshavn, tlf. 217 535 / 313 535
Flogvøllurin: tlf. 212 765 /358 800
Teldupostur: avis@post.olivant.fo

Avmisgávum vóru km og kr umbýtt í Sosialinum í gjár!

Bilasølan v/ Óssur Johannesen
tel 315354 - www.audi-vw.net

Føroyski báturin í Fuglafirði

Fyrilestur um hin føroyska róðrarbátin á Fuglafjarðar Bókasavni

BÁTUR
Tíðindaskriv

Andras Mortensen fer at halda fyrilestur í Fuglafirði um hin føroyska róðrarbátin, ið hann hevur skrivað Ph. D. ritgerð um, ið kom út í bók í 2000

Fuglafjarðar Bókasavn hevur havt eina rød av kvøldsetum, har ymiskir rithøvundar hava verið og tosað um bøkur sínar, um tað at skriva, yrkja ella eitthvørt annað, sum liggur teimum á hjarta. Hesi kvøldini hava verið hildin nøkur mánakvøld í vetur á Fuglafjarðar Bókasavni, og hava kvøldini verið sera hugnalig og áhugaverd.

Ikki minni áhugavert verður tað mánakvøldið kl. 20:00, tá Andras Mortensen kemur at halda ein fyrilestur um Ph. D. ritgerð sína um hin føroyska róðrarbátin, sum kom út í bók í 2000. Andras Mortensen fór undir ritgerðina, tá ið hann varð settur í starv á Føroya Fornminnissavni og millum annað fekk til uppgávu at taka sær av bátasavninum. Á bátasavninum eru savnaðir 27 bátar og ein stórur partur av teimum lutum, sum hoyrdu sjólívinum til í eldri tíð. Andras Mortensen skrivar í fororðinum, »at skjótt kendist, at við hesu uppgávu var neyðugt at útvega sær innlit, tí hóast ikki so lítið longu var útkomið á prenti um bátar og sjólív, megnaði tað ikki í nóg góðan mun at svara øllum teimum fyrispurningum, ið mær sum savnsvørði vórðu settir. Eyðsæð var, at her lá ein granskingaruppgáva fyri framman.«. Í ritgerðini verður greitt m.a. frá bátasmíði, bátastøddum, útbúnaði í bátinum, fiskileiðir og fiskiskapur, veiða, bátsskipan, bátsband og frá nýtíðarbátinum.

Høvið verður hjá áhoyrarum at stilla høvundanum spurningar aftaná og at fáa sær ein drekkamunn við onkrum góðum afturvið. Tiltakið er ókeypis og øll eru vælkomin.

Mánakvøldið 17. mars kl. 20:00 fær Fuglafjarðar Bókasavn vitjan av Tóru Tóroddsdóttir, sum hevur skrivað bókina, »Rura«. Bókin snýr seg um rørslumenning og sansaskipanina hjá føroyskum børnum. Hetta tiltakið er somuleiðis ókeypis, og øll eru vælkomin.

Jens Frederiksen í Klaksvík

Leygardagin 22. febr. kl. 16 skipar Norðoya Listafelag fyri almennum fyrilestri við Jens Frederiksen, leiðara á Listasavni Føroya

FYRILESTUR
Solby A. Eliasen

Klaksvík:
Jens Frederiksen fer at halda fyrilestur í býráðshøllini nú leygardagin kl. fýra. Hann fer m. a. at tosa um evnini: Ber til at tosa um staðbundna list í føroyskari myndlist? Hvørji eyðkenni hevur hon - og nær fer hon út um tað staðbundna? Er tað staðbundna dygd í sjálvum sær?

Við hesum fyrilestrinum verður roynt at svara hesum spurningunum gjøgnum sundurgreining av nøkrum verkum, sum Norðoya Listafelag eigur. Høvi verður eisini hjá áhoyrarunum at seta spurningar.

Jens Frederiksen var í Klaksvík og helt fyrilestur fyri einum ári síðani. Tá var undirtøkan góð millum fólk. Og Norðoya Listafelag vónar, at fólk aftur hesa ferð taka væl undir við tiltakinum - bæði limirnir og fólk annars.

Tøkk

Ein hjartans tøkk til tykkum á Ellisheiminum í Vágum, sum gjørdu mær 80 ár dagin so hugnaligan. Somuleiðis tøkk til tykkum, sum vitjaðu meg.

Richard Johannesen

Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum gjørdu mær 85 ára dagin ógloymandi. Ein serlig tøkk verður send Vestmanna Kirkjukóri.

Fanny Johannesen
Sandavági

Komandi leygardag klokkan fýra verður fyrilestur í býráðshøllini í Klaksvík við Jens Frederiksen, leiðara á Listasavni Føroya

Gjøgnum tíð og rúmd í tinghúsinum

Ingálvur av Reyni hevur málað málningin, sum er komin upp at hanga í tingsalinum
Mynd: Jens Kr. Vang

Tíðliga seinnapartin mikudagin kom málningurin hjá Ingálvi av Reyni, Gjøgnum tíð og rúmd upp at hanga í tingsalinum. Allir løgtings- og landsstýrismenn vóru komnir saman at síggja málningin, og Ingálvur og konan, Elsa, vóru eisini hjástødd

LIST
Ingrid Bjarnastein

Ingálvur av Reyni er listarmaðurin aftanfyri málningin, Gjøgnum tíð og rúmd, sum mikudagin kom upp at hanga í tingsalinum. Málningurin hongur aftanfyri tingformannin og røðarapallin.

Mikudagin vóru allir løgtings- og landsstýrismenn komnir saman fyri at síggja málningin, og var Ingálvur sjálvur og konan, Elsa, eisini hjástødd.

Edmund Joensen, løgtingsformaður, takkaði Ingálvi fyri, at hann vildi átaka sær uppgávuna, sum allir løgtings- og landsstýrismenn koma at gleðast yvir.

Tá Ingálvur av Reyni fyrstu ferð varð spurdur um, at hann vildi mála ein málning til tingsalin, bar hann seg undan, tí hann segði, at heilsa og aldur bilaðu.

Eina tíð seinni hoyrdist tað, at Ingálvur var betri fyri, og hann varð tí spurdur einaferð afturat, og hesuferð var svarið játtandi.

Dámar væl

Heidi Poulsen, arkitekturin aftanfyri tingsalin, er væl nøgd við málningin, og heldur, at hann tekur seg væl út á vegginum aftanfyri tingformannin.

– Tingsalurin er neutralur í litum, og litirnir koma frá fólkunum inni her. Tá tað kemur til litirnar, so stuðla teir uppundir rúmið, sigur Heidi Poulsen.

– Tað, at málningurin hongur aftanfyri tingformannin og røðarapallin ger, at røðarapallurin verður settur í fokus.

Heidi fortelur, at Ingálvur gjørdi fyrst ein málning at hanga upp sum roynd. Hann vildi síggja, hvussu málningurin megnaði frástøðuna í tingsalinum, tí atelierið er ikki størri enn eini 4-5 metrar. Hann var ikki nøgdur við tann málningin, so tí varð hesin málaður, og verður mett, at hann tolir betri frástøðuna, tí tingsalurin er so stórur.

– Eg eri væl nøgd við málningin, og mær dámar hann væl, sigur Heidi Poulsen.

Og eftir løgtings- og landsstýrismonnum at døma, so vóru teir allir á einum máli um, at málningurin var eitt meistaraverk.